VINNU SÍÐURNAR

Nr. 52 • mikudagur • 16. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Størri avkast = størri váða




ÍLEGGJARAFELØG

*Jan Müller*

Tað kom sum ein bumba, tá tað í gjár frættist, at umleið 150 føroyingar helst hava mist einar 100 mill. kr. í einum týskum íleggingarfelag, sum er l atið aftur vegna svik. Enn er ikki greitt, um nakað av hesum pengum, fæst aftur men tað er greitt, at tá íleggingarfeløg lova hægri avkast, so merkir tað eisini størri váða fyri íleggjaran.

Stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, sum á síðulinjuni hevur verið eygleiðari til gongdina, har nógvir føroyingar – vegna lágu rentuna í Føroyum - seinastu árini hava valt heldur at seta sínar pengar í útlendsk íløgufeløg, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til aktuella málið við Phoenix. Hann kann bert staðfesta, at við at fáa lovað hægri avkast, so tekur man eisini ein størri váða.

Hann vísir annars til tað hann skrivaði alment fyri tveimum árum síðani. Har ávaraði hann móti eini slíkari gongd, sum síðani tíverri er vorðin veruleiki. Er tað nakar, sum viðvarandi lovar eina rentu, sum er hægri enn marknaðarrentan, so er talan um eina peningamaskinu, og tær eru vanliga ólógligar ella kriminellar. Tað var henda so. Ella hevur man átikið sær ein hægri váða, sum man ikki hevur fingið nóg gott innlit í. Tað sigur seg sjálvt, at tá vanliga marknaðarrentan er uppá eini 3%, og fólk fara eftireini rentu uppá 14, so tekur man eisini ein tilsvarandi størri váða á seg.

Lesarainnleggið sum bankastjórin sipar til stóð í Dimmalætting fyri tveimum árum síðani. Har gjørdi Jørn Astrup Hansen vart við vandan at seta pengar uppá spæl, har rentan skuldi vera ovurhonds høg. Har skrivaði hann eitt nú í aftursvari til oddagrein í Dimmalætting:

" Vi har én gang før - i 80'erne - her på Færøerne givet efter for den illusion, at vi kunne have vort eget renteniveau. Forholdet førte til en omfattende, og ødelæggende, rentearbitrage. Formentlig er skattearbitrage et mere dækkende udtryk for det, der fandt sted. Forudsætningen for den særlige færøske rente var nemlig de særlige regler for beskatning af indlånsrenter optjent i færøske pengeinstitutter. Det var dejligt, så længe det varede. Men arbitragen havde karakter af en pengemaskine, og sådanne maskiner viser sig ved nærmere eftersyn altid at være blændværk."

Og bankastjórin skrivar víðari:

"Dimmalættings lederskribent efterlyser på vegne af den almindelige sparer et alternativ til den lave indlånsrente i pengeinstitutterne. Nostalgisk mindes Dimma de glade dage, da et nyt pengeinstitut, Fossbankin, gjorde livet usikkert for de gamle pengeinstitutter - og sig selv. Lederskribenten undrer sig over, at der her på øerne ikke er flere finansielle institutter, der tilbyder at tage sig af vores opsparing. Til en højere rente, forstås.

Der er grund til igen at slå fast, at der som udgangspunkt kun findes én - lav - rente på danske kroner. Men i tillæg til den rene rente kan der være en risikopræmie. Sædvanligvis er der således en merrente på lange obligationer; riskoen er, at renten stiger, hvorefter obligationskurserne falder. På samme måde bærer en fordring på Palleba en højere rente end en fordring på Landsstyret, der antages at være en bedre betaler end Palleba.

Når lederskribenten efterlyser andre placeringsmuligheder for sparerne end pengeinstitutternes indlånskonti, er det i realiteten ikke en højere rente - men en højere risiko - lederskribenten efterlyser. Et sådant behov er der altid nogen, der er rede til at dække. I gamle dage havde vi alkymister; nu om dage har vi sidegadevekselerere.

I øvrigt kom der da for nogle få år siden til Færøerne et nyt pengeinstitut, som tilbød sig med en rente (!) på helt op til 54 pct. p.a. I dag sidder der sikkert nogen tilbage, som finder, at de ikke fik tilstrækkelige oplysninger om risikoen ved den slags placeringer. Måske det ikke var tilfældigt, at renten på 54 pct. var skrevet i sand." skrivaði Jørn Astrup Hansen fyri tveimum árum síðani.

## Fíggjareftirlit og innskjótaragrunnur

Danska fíggjareftirlitið hevur annars sent tíðindaskriv út um Phoenix Kapitaldienst GmbH, sum er móðurfelag hjá tí danska fondsmeklarafelagnum, Phoenix Fondsmæglerselskab A/S. Týska fíggjareftirlitið BaFin hevur nú eisini sent skriv út um støðuna í týska felagnum. Har stendur m.a. at Phoenix Kapitaldienst GmbH er insolvent, og at tað 14. mars 2005 er farið undir eina insolvensprocedure yvir fyri felagnum við rættin í Frankfurt/Main. BaFin hevur sambart skrivinum forbjóðað Phoenix Kapitaldienst GmbH at móttaka inngjaldingar frá kundum ellar at gjalda út. BaFin hevur eisini tikið lisensin hjá felagnum at reka fíggjarvirksemi aftur.

BaFin fer skjótast at taka støðu til viðgerðina av krøvum frá íleggjarum móti felagnum. Týski innskjótaragranantigrunnurin – EdW – fer eftir tað at taka støðu til krøvini.

I tíðindaskrivinum er hetta telefonnr. givið upp til íleggjararnar Hotlinetelefonnummar til BaFin, 0228-4108-1010. Týski innskjótaragrunnurin hevur 030-203699-5626



Tyrlutænastan hjá Atlantic Airways

**Tyrluflúgvingin á páskum 2005**

**Skírishósdag** verður flogið sum fríggjadag.
**Langafríggjadag** verður ikki flogið.

1. **Páskadag** verður ikki flogið.
2. **Páskadag** verður flogið sum sunnudag, tó verður flogið til Mykinesar aftaná rutuna, um tørvur verður fyri tí.

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo

www.atlantic.fo

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

KT-STARV Á HAGSTOVUNI

VIT SÓKNAST EFTIR EINUM VÆL ÚTBÚNUM STARVSFÓLKI TIL KT DEILDINA.

Á Hagstovuni verða flestu hagtalsuppgávur loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum Oracle umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt Oracle menningar- og forritannaramboð, sum SQL, PL/SQL, Warehouse Builder etc. Somuleiðis brúka vit Oracle IAS/PORTAL í samband við heimasíðuna hjá stovninum.

Kunnleiki til eitt ella fleiri av hesum amboðum er ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Fyrst og fremst sóknast vit eftir einum dugnaligum fólki, við innliti í datamodell, databasuskipanir og programmering.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða víðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2005.

Set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00 vilt tú hava meira at vita um starvið.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA

TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO